


# SKRIVSTOVUFÓLK Á AKSTOVUNI

**Søkt verður eftir skrivstovufólki til akfarsbólkin á Akstovuni at byrja 1. januar 2021. Talan er um fulltíðarstarv.**

## UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting av eigarabroytingum og akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum og vegskatti
- Málsviðgerð
- Kassauppgerð
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

## FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein er fyrikomandi og kundavinarligur, og hevur góð samstarvsevni. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika at arbeiða við teldu.

## SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Fíggjarmálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

## UMSÓKNIR

Umsóknir við avritum av møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Akstovan**
Hoyvíksvegur 57, Postsmoga 3206, FO 110 Tórshavn

ella **akstovan@akstovan.fo**

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara á telefon 350418. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **19. oktober 2020.**

---

*Akstovan er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfarstøkniligar kanningar og akfarseftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfarsskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 22 fólk.*

---

AKSTOVAN

*www.akstovan.fo*